HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
.i a . o

r r ar ø

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
m. 8. 00, á . ma s 000
190.000,-

Citroen Xsara 1,6i 5h
m. 30.000, á . eb. 1 8
107.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H
m. 83.000, á . u i 1
140.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
m. 0.000, á . o . 1
152.000,-

Sosialurin - 311820

Citroen Jumper CH. v/last
m. 1 0.000, á . au . 1 8
130.000,-

Citroen Saxo 1,4i 3h
m. .000, á . ma s 1
57.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
m. 161.000, á . u i 1
70.000,-

Ford Sierra 2,0i CLX 4h
m. 110.000, á . o . 1 1
45.000,-

Peugeot 306 1,9D 4H
m. 161.000, á . mai 1 5
84.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h
m. 35.500, á . au . 1
115.000,-

Mazda 323 1,5 4h
m. 130.000, á . a . 1
75.000,-

Ford Escort 1,6i STC. VAN
m. 5.500, á . ma s 1
53.000,-

Toyota Camry 2,0 GLi 4h
m. 138.000, á . au . 1 8
24.000,-

Peugeot 406 2,0i
m. .000, á . au . 1 6
130.000,-

Fiat Tipo 5H
m. 10 .000, á . mai 1 8
26.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Skúlastríð í Skopun:

Vilja hava lærara frá

– Foreldur í Skopun hava savnað inn undirskriftir fyri at fáa ein lærara koyrdan

SKÚLASTRÍÐ
Áki Bertholdsen

Skopun: Nú hevur aftur eitt skúlastríð tikið seg upp. hesuferð er tað foreldur í Skopun, sum reisa seg ímóti skúlanum.

Og ónøgdin við skúlan í Skopun er so stór, at foreldrini nú hava savnað inn undirskriftir.

Tað er fyrsta læraranum í Skopun, Ingun Simonsen, sum stríðið stendur um.

Skopuningar eru so ónøgdir við fyrstalæraran, at teir vilja hava hann koyrdan.

Í Skopun fekst ongin at siga nakað alment um málið í gjáramorgunin. Men góðar keldur, vit hava tosað við, siga, at trupulleikarnir í skúlanum byrjaðum tá ið Ingun Simonsen varð sett sum fyrstilærari fyri nøkrum árum síðani.

Skopuningar siga, at tá tóku samstarvstrupulleikar seg skjótt upp ímillum hana og ein annan lærara, Sigurd Bærentsen.

Av einhvørjari orsøk fekk fyrstilærarin eitt horn í síðuna á hinum læraranum og hevur síðani roynt at fáa hann frá.

Men nú var ovboðið og um vikuskiftið tóku foreldur í Skopun seg saman og fóru at savna inn undirskriftir inn.

Og í Skopun er ongin ivi um, at bygdarfólkið stendur aftanfyri teirra gamla lærara, tí brævið, sum foreldrini skrivaðu undir uppá, er ein áheitan á Mentamáslastýrið um at fáa Ingun Simonsen frá.

Keldur okkara siga at 27 foreldur í Skopun hava skrivað undir áheitanina og sostatt er næstan full semja um áheitanina, tí tey foreldur, sum ikki hava skrivað undir, kunnu teljast á aðrari hondini og tað eru bara tað eina av foreldrunum hjá hvørjum barni, sum hava skrivað undir.

Í Mentamálastýrinum fæst ongin viðmerking til málið. Óli Holm, landsstýrismaður í mentamálum, váttar, at undirskriftirnar eru komnar, men málið er ikki komið á hansara borð enn, so hann hevur ongar viðmerkingar.

Tað skilst eisini, at skúlastýrið í Skopun skal hava fund um málið seinni í vikuni.

Ingun Simonsen, fyrstilærari í Skopun er komin uppá tvørs av foreldrunum í bygdini og nú vilja tey hava hana frá

Óli Holm, landsstýrismaður, váttar at hava móttikið undirskriftirnar úr Skopun, men vil annars ikki gera viðmerkingar til málið

Onga viðmerking

Sosialurin fekk fatur á fyrsta læraranum í Skopun, Ingun Simonsen á middegi í gjár fyri at hoyra um skúlamálið, ið nú hevur stungið seg upp í Skopun. Hon hevði bert tað at siga, at hon vildi fyrst tosa við sakføraran áðrenn hon vildi úttala seg um málið.

Løtu seinni tosaðu vit aftur við Ingun Simonsen, og tá hevði hon bert hetta at siga:

– Eg havi onga viðmerking til málið. Eg havi tosað við sakføraran og Lærarafelagið, og eg velji onki at siga um málið, tí tað er eitt umfatandi mál.

-ib

Menningartarnað vitja

TÍÐINDASKRIV
Verkstaðið »Vón«

Leiðarin fyri Verkstaðið »Vón« fekk í fjør ein fyrispurning frá Morten Christoffersen, lærara á einum listarskúla fyri menningartarnað í Silkeborg, um áhugi var fyri einari Workshop á Verkstaðnum »Vón«.

Hetta ljóðaði sera áhugavert og lá væl í trá við okkara áhugamál.

Meiningin var umframt at skipa fyri listar-workshop, eisini at skipa fyri onkrum mentunarligum tiltaki og møguliga onkrari útferð.

Við á ferðini til Føroya eru 11 menningartarnað og tríggir lærarar/pedagogar og er ætlanin, at tey skulu læra okkum at arbeiða við grafikk og akvarell.

Frammanundan hetta arbeiddi m.o. Jórunn Dánjalsdóttir við at senda myndir hjá nøkrum av okkara listarliga áhugaðu menningartarnaðu niður til Danmarkar til eina listaframsýning á Ráðhúsinum í Keypmannahavn.

Persónligar hendingar gjørdu, at Maud Wang Hansen ikki fekk arbeitt meira við work-shoppini og setti hon seg tískil í samband við Jórunn og spurdi, um hon vildi seta seg í samband við Morten. Eitt tætt telefon-samband kom millum Jórunn og Morten og í dag er so komið so langt á leið, at vit kunu gera eina skrá fyri dagarnar har vit fáa vitjan úr Silkeborg.

Sjálv work-shoppin er ætlað arbeiðsfólki og starvsfólki á nøkrum av teim vardu verkstøðunum í Føroyum og er okkara luttøka ikki stór í mun til tali av teim vitjandi. Tað, sum er umráðandi fyri okkum, er harafturímóti, at tey sum luttaka, hava áhuga fyri og eru í dagligum sambandi við tað listarliga og skapandi arbeiði á verkstaðnum.

Vónandi kunnu vit seinni skipa fyri líknandi tiltaki fyri fleiri luttakarum í Føroyum, men beint nú er umráðandi hjá okkum, at fáa innlit í hvussu hini arbeiða og røkka teirra framúrskarandi úrslitum við skapandi listini.

Vit hava ofta havt á orði, at neyðugt er at gera okkurt fyri at fáa fram í ljósið, tey listarfólk, sum eru millum menningartarnaði í Føroyum. Fleiri tiltøk hava verið, har Javni m.a. hevur skipað fyri framsýningum av myndum í Smiðjuni í Lítluvík og í Listaskálanum. Mong hava ogna sær eina vakra mynd og vónandi kunnu vit framyvir eisini koma at fáa henda møguleikan.

Umráðandi er at gera pláss fyri listini og at duga at virðismeta hana.

Tað var eyðsýnt á framsýningini í Keypmannahavn, at vit millum okkum eiga sera góð listarfólk.

Eftir hjá okkum er nú at bera so í bandi, at vit eisini millum pedagogar og onnur fakfólk fáa skapt eitt forvitni og eitt innlit í, hvat vit kunnu gera fyri at skapa so góðar og gróðrardyggar karmar um listina sum gjørligt.

Stigtakarin til tiltakið var leiðarin á Listarskúlanum í Silkeborg Morten Christoffersen, og var tað ikki torført at taka av einum samstarvi við hesi fólkini. Verkstaðið »Vón«, v/ Maud Wang Hansen, Jórunn Dánjalsdóttur, sum arbeiddi við listarframsýningini á Ráðhúsinum í Keypmannahavn, Oggi (Karsten Olgar Lamhauge), listarmaður og starvslærunæmingur á Verkstaðnum »Vón« og Javna, eru sostatt tey, ið fara at arbeiða víðari við at fáa lagt lunnar undir eina menning av listini hjá menningartarnaðum arbeiðsfólki á vardu verkstøðunum kring um í Føroyum.

Skrá fyri listar-work-shop

Leygardagin 25. mai koma 14 vitjandi úr Danmark við flogfari, tey gista á vallarheiminum Tórshavn.

Sama kvøld skipar Javni fyri árligu veitsluni, sum í ár verður hildin á Strondum.

Tíðliga sunnumorgun 26. mai verður ein fundur fyri luttakarnar og aftaná verður fyriskipaður ein túrur til Gjáar við bussi.

Mánadagin 27. mai byrjar so sjálv work-shoppin, ið verður hildin í hølunum hjá kvøldskúlanum í Kongagøtu. Kvøldskúlin hevur bjóða okkum hølini fyri at stuðla tiltakinum.

Kl. 13.00 mánadagin letur Sigrun Niclasen (listarkvinna) upp eina ferniltering á torginum í SMS. Ætlanin er eisini at fáa onkran góðan tónleikara at spæla nøkur løg. Vístar verða fram myndir, sum eru gjørdar frammanundan, at hetta tiltakið bleiv sett í verk. Hesar myndir eru gjørdar av ymiskum arbeiðsfólkum á vardu verkstøðunum og eisini av teimum, sum hava sýnt fram í Danmark og av donsku luttakarunum.

Týsdagin 28. mai heldur work-shoppin fram í hølunum í Kongagøtu. Týskvøldið verður somuleiðis ein ljósmyndarøð v/ Morten sýnd fram á Verkstaðnum »Vón« um arbeiði á listarskúlanum í Silkeborg. Hetta tiltakið er opið fyri øllum áhugaðum.

Mikudagin 29. mai heldur work-shoppin fram ein part av degnum. Teir donsku gestirnir hava sostatt møguleika at fara ein túr at hyggja at býnum og keypa sær okkurt tinganest at hava við heim.

Mikukvøldið kl. 18.00 – 23.00 verður skipað fyri einari kvøldsetu í sjónleikarahúsinum har m.a. Emmas Bluesband og Hanus Johansen spæla tónleik, yrkingar verða lisnar upp og møguleiki er fyri at keypa sandwich og okkurt at drekka afturvið. Atgongumerki kosta kr. 40,– og øll áhuga eru vælkomin.

Hósdagin 30. mai venda donsku gestirnir heim aftur til Danmarkar.

Bjargingarfelag nýggja nevnd

TíÐindaskriv
Havnar Bjargingarfelag

Á aðalfundi í Havnar Bjargingarfelag hin 21. apríl 2002 varð nýggj nevnd vald. Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali, hesir vóru Súni Vinther og Guttormur Eysturoy, meðan Kartni Olsen áður hevur tikið seg úr nevndini. Jens Hansen og Edvard Kjeld stóðu ikki fyri afturvali. Í nevndini vórðu valdir Fríðrikkur Heinesen, Súni Vinther og Heini Eysturoy. Niels Olsen er tiltakslimur.

Nevndin hevur skipað seg við Heina Eysturoy sum formanni, Jens Hansen sum næstformanni, Fríðrikki Heinesen sum skrivara og Edvardi Kjeld sum nevndarlimi.

Havnar Bjargingarfelag hevur seinastu árini havt sera ringar arbeiðsumstøður, og hevur virksemið verið tarnað av, at felagið eingi høli hevur havt at húsast í, eftir at hølini ið felagið hevði á Bryggjubakka vórðu latin øðrum

Savnsmynd frá bjargingarroyndini Ytra

Havnar Bjargingarfelag er ein sjálvboðin felagsskapur, ið hevur til endamáls at veita hjálp í samband við vanlukkur á sjógvi og landi, í tilburðum har verandi skipanir ikki einsamallar klára uppgávuna.

Havnar Bjargingarfelag hevur seinastu árini havt sera ringar arbeiðsumstøður, og hevur virksemið verið tarnað av, at felagið eingi høli hevur havt at húsast í, eftir at hølini ið felagið hevði á Bryggjubakka vórðu latin øðrum.

Nýggja nevndin hevur sett sær fyri, at arbeiða við at fáa felagnum nøktandi høli. Tann útgerðin felagið eigur, er m.a. ein bilur og onnur bjargingarútgerð, ið krevur at vera í góðum standi og vera til taks tá ið brúk er fyri henni.

Nýggja nevndin hevur somuleiðis sett sær fyri, at skipa fyri skeiðum og venjingum t.d. skeiðum í 1. hjálp og leiting. Somuleiðis er ætlanin at fáa greiðu á hvønn leiklut felagið skal hava, í sambandi við eina komandi tilbúgvingarætlan.

Felagið er fyri øll, ið á ein ella annan hátt vilja geva eina hjálpandi hond, tá ið vanlukkur henda. Uppgávurnar eru so mikið ymiskar í felagnum, at tørvur er á øllum, gomlum og ungum, kvinnum og monnum.

Tey, ið ynskja at gerast limir í felagnum eru vælkomin at boðað felagnum frá hesum.